# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Lisa Dam, Sandavágur**, andaðist mánadagin 3. september, 85 ára gomul. Kistan fer av Ellisheiminum á Sýnini mikudagin kl. 18 í Sandavágs kirkju. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 14.

**Virgar Frýdal, Tórshavn**, andaðist 3. september, 90 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Jógvan Rasmussen, Strendur**, vanliga nevndur Egga, andaðist sunnudagin 2. september á Eysturoyar Røktar- & Ellisheimi, 81 ára gamal. Kistan fer av Ellisheiminum týsdagin kl. 18.00 í Sjóvar Kirkju. Jarðarferðin verður úr Sjóvar Kirkju mikudagin kl. 14.00. Tey, ið ynskja at minnast Jógvan við blómun ella kransi, kunnu lata eina peningagávu til Kelduna í Skálafirði.

## Til mammu mína
## Bettu Eið, Nes Hvalba
## á 85 ára degnum 4. august 2007

*Við Geilánna vøgga mín stóð,*
*har ið faðir og móður so góð*
*meg aldu og lærdu á kærleikans slóð,*
*- við Geilánna vøgga mín stóð.*

*Eg tøkk tær vil bera mín móður í dag*
*for alt tað, tú ert fyri meg,*
*meg bønina lærdi – mítt lívs grundarlag,*
*tú studdi og signaði meg*

*Eg takki tær móður for kærleika tín,*
*tú umsorgan altíð mær ber,*
*tú mann mín og børn míni tekur til tín,*
*tey takka tær eisini her.*

*Nú ár eru runnin og gránað er hár,*
*tó lívsneistin køvdur ei er.*
*Eg ynski tær móður mong heilsugóð ár,*
*má Harrin tær fylgja á ferð.*

**Heilsan Jórun**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá elskaða kona, mamma, vermamma og omma okkara

**Anna Hansen**
Vestmanna

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til tykkum á G4 á Landssjúkrahúsinum fyri umsorgan ta tíðina hon var hjá tykkum.
Tøkk til tykkum, sum bakaðu og hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Saron.
Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Oddmar, Oliver, Súsanna, Jóhan Hendrik, Jolina og Guðrið**

## Tøkk

Eina hjartans tøkk sendi eg tykkum, sum mintust til mín og gleddu meg, tá ið eg fylti 85 ár. Takk tit, ið stukku inn á gólvið ella ringdu, góvu mær blómur, gávur og sendu mær heilsanir. Og eina serstaka tøkk vil eg veita mínum børnum, svigarbørnum og øllum tykkara, takk fyri tað frálíka vikuskiftið vit høvdu norðuri í Mikladali í samband við føðingardagin.
Jesus veri hjá tykkum.

**Heilsan**
**Betta Eið, Nes, Hvalba**






**Dagurin**
**5. september. Regina**, deyð umleið ár 300. Ung rómversk genta, sum varð tikin av døgum fyri trúar sakir. Navnið er av latínskum uppruna og merkir drotning.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri maður, faðir og abbi

**Virgar Frýdal**
Tórshavn

andaðist mánadagin 3. september á Landssjúkrahúsinum 90 ára gamal.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

*Familjunnar vegna*
**Hilda Frýdal**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma okkara

**Lisa Dam**
*fødd Jacobsen*
úr Sandavági

andaðist 3. september, 85 ára gomul.
Kistan fer úr Ellisheiminum á Mýruni mikudagin klokkan 18
Jarðarferðin verður úr Sandavágs kirkju hósdagin 6. september klokkan 14.

*Familjunnar vegna*
**Maud, Arndis, Eydna og Jónhild**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara høgt elskaði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Jógvan H. Rasmussen**
*vanliga nevndur Egga*
Strendur

andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi, sunnudagin 2. september, 81 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Sjóvar Kirkju, mikudagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Sonja**
**Olina, Svenhild, Petur Olaf og Joan**